# Vilstur vegur!

ANDRIAS REINERT





Ein 2007.. og 100 ár fram?-vegur er vilstur og farin heilt av kós oman fyri Villingadalsvegin í Havn.

Gaman í er hendan líðin, hann er vilstur í, einasta stað her um leiðir, har huldufólk og vættrar enn trívast í urðum og klettum, men - hava vit ikki eisini valt inn í býráðið í høvuðstaðnum fólk, sum duga at snara 112 á fartelefonini og fáa bjargað hesum ólukkuliga vegi úr aftur hulduheyggi??

Trafikkaos í Vágoynni varð spátt, tá Vágatunnilin lat upp, og somuleiðis bæði í Leirvík og Klaksvík, tá næsta stóra framstig var gjørt á hesum øki; men sum "altíð var Havnin best!": Langt áðrenn farandi varð ígjøgnum Kollfjarða/Kaldbaksbotnar-holið, kom fjáltur á Býráðið í Havn, tí bilar plagdu jú altíð at koma oman í býin oman av Oyggjarvegnum!!!?

Mikkjal fekk frá Tórshavnar Býráð at vita, at rundkoyring, har Hoyvíksvegurin kemur í Ringvegin, kundi bøtt munandi um væntaða stóra ruðuleikan, men vit máttu so sanniliga eisini fáa fatur í aftur Oyggjarvegnum sum skjótast.

Øll vistu tá, at Oyggjarvegurin byrjaði undir Krákugjógv!, og okkara størsti kapasitetur á økinum varð settur á uppgávuna at binda nýggja innkomuvegin, sum var komin til Havnina, í aftur Oyggjarvegin undir Krákugjógv, so ein partur av tí øðiligu flóðaldu av bilum norðani frá aftur kundi koma oman í Havnina oman av okkara higartil í ferðsluhøpi størstta stoltleika: OYGGJARVEGNUM.

Heini Olsen setti nakrar vakrar linjur á kortið, so ein partur av bilunum, ið komu úr Kaldbaksbotni, aftur kundi nærkast høvuðstaðnum við góðum útsyni oman frá Wenzel Petersen. Ongan havi eg sæð set fingur á arbeiði, sum Heini hevur lagt úr hondum, og fyrst nú byrjar tað tragisk/komiska:

"Lívið er í bylgjum, – tá tað gongur uppeftir, halda vit at alt er "normalt", og tá tað gongur niður aftur, halda vit verðins enda vera nær" segði Edvard Mitens á sinni. Bakkkøst komu, vegurin varð gloymdur, og politikarar tú tá tosaði við hildu fyri: "nei góði hasum vegnum verður einki av í okkara tíð"!

Nú er aftur góður byrður "på syklestien" sum Jacob Haugaard segði, og svøvntungi vegurin er raknaður við aftur. Hesi 25 árini hann hevur sovið, er hann tó vaksin frá einum "trivaligum reyðmaðki", ið skuldi beina nakrar bilar av Kaldbaksvegnum yvir aftur á Oyggjarvegin, til ein "miðgarðsorm", ið við fúkandi ferð skal orka at slúka alt sum undirsjóartunlar, Suðuroy/ Sandoyferja og nýggjur flogvøllur ætlandi fara at spýta úr sær av ferðslu næstu árini.

Sum snarljós av himni boðaði Landsverk hin 14/05 okkum, sum hava havt marruna av hesum nú evnaliga, men vilsta ormi alla hesa tíð, til kunnandi fund um vegagerð, sum teimum var álagt at "fara undir í næstum". Vegaføring varð víst við framkomnari tøkni, har alt sá "imponerandi" og stórsligið út.

Vit fóru tó av fundi við tí fatan, at framløgan var ikki um eitt "projekt", ið teir vóru ovurfegnir og ernir av at fara í holt við, men heldur eitt skump til okkara fólkavaldu, at fáa teir eisini at raknan við, og geva "miðgarðsorminum" eina betri og rúmsáttari legu.

(PS: Heini kann tó vera errin av, at eingin enn veruliga hevur torað at pilka nevnivert við nú 25 ára gamla "reyðmaðkin").



# Taka barnagarðin í nýtslu

**Nólsoy:** Í samband við, at nýggi dagstovnurin Látrið í Nólsoy alment verður tikin í nýtslu, verður móttøka í dagstovninum fríggjadagin 18. mai kl. 17.00

Undir móttøkuni fer Heðin Mortensen, borgarstjóri, at bjóða vælkomin, og Hildur Eyðunsdóttir, formaður í Mentamáladeildini hjá Tórshavnar kommunu, fer at halda røðu.

Eisini fer kendi nólsoyingurin Kim Hansen at syngja undir hátíðarhaldinum.

Móttøkan er almenn, sigur Tórshavnar Býráð í tíðindaskrivi.



# Landsdansistevna í Suðuroynni

**Fríggjadagin 18. og leygardagin 19. mai verður landsdansistevnan í Suðuroynni**

FØROYSKUR DANSUR
*Tíðindaskriv*

Byrjað verður fríggjakvøldið kl. 20.00 í Framtíðini í Vági, har Sláið Ring – landsfelag føroyskum dansi at frama, skipar fyri mentanarligum tiltaki. Fyrst fara børn og kvinnur úr Sumba fara at kvøða eina vísu og aftaná verða tað børn úr 8. flokki við Vágs Skúla, sum kvøða Huldugentuna. Síðani verða tríggir fyrilestrar og hugleiðingar. Eli Poulsen úr Sumba fer at hugleiða um dansin, og hvat hann hevur fingið og fær burtur úr honum, síðani sigur Poul Arni Holm av Tvøroyri, fyrverandi sangari í orkestrinum Týr, nakað um føroyska dansin og hvussu hann kann kveikja í tónleikin.

Seinasta fyrilesturin heldur Andrea Opielka úr Bochum í Týsklandi. Hon skrivar doktararitgerð um føroyskan dans, við serligum atliti til dansispøl, og fer hon at draga fram ymiskt úr øllum tí rúgvismika tilfari, hon hevur samlað. Saman við fyrilestrinum verða eisini dansað nøkur dansispøl. Kvøldið endar við, at vit fara upp á gólv og dansa til midnátt.

Leygardagin 19. kl. 18.00 verður sjálv landsdansistevnan sett við ítróttarhøllina í Trongisvági. Tað verður Bjarni Vestergaard, fyrverandi formaður í Sláið Ring, ið setir stevnuna. Aftaná fer Ketty Andreasen, formaður í Tvøroyrar Dansifelag, sum umboðar tey fýra dansifeløgini í oynni, Sumbiar Dansifelag, Jómsvíkingar, Tvøroyrar Dansifelag og Suðuroyar Norðara Dansifelag, at bjóða vælkomin.

Borðhaldið byrjar kl. 19.00 og eftir borðhaldið verður farið upp á gólv.

# Tíðindamannavitjan frá Isle of Skye

VITJAN
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Seinasta vikuskiftið var ein bólkur úr Føroyum á vitjan á oynni Skye vestantil í Skotlandi.

Henda vitjan var ein partur av royndunum at fáa skapað samband millum oyggjasamfeløgini bæði. Serstakliga var vitjanin ætlað sum ein kunning um arbeiðið, sum verður gjørt á Isle of Skye at varðveita og menna geliska málið, sum er tað upprunaliga málið í hesum partinum av Skotlandi. Fremsti talsmaðurin fyri hesum royndum er Sir Iain Noble, sum er maðurin aftan fyri geliska lærda háskúlan á Skye. Hann er sannførður um, at orsøkin til, at tað hevur gingist so væl í Føroyum er, at føroyingar hava sítt egna mál og egnan samleika, og hetta er eisini loysnin fyri skotar.

Sosialurin var við á ferðini, og fara vit fram at hava áhugaverdar frásagnir frá ferðini, eins og tað verður greitt frá hesum lítla oyggjasamfelag, sum vit hava heilt fitt til felags við. Hetta er ikki minst aktuelt nú vit, umframt flogrutuna til Skotlands, eisini sleppa hagar við Norrønu, og tá verður lætt at koma til pláss sum Isle of Skye við bili. Tað er nevniliga brúgv yvir á oynna.

Vit fingu á ferðini váttan fyri, at tað eisini á Isle of Skye er áhugi fyri Føroyum. Mánadagin kemur tíðindamaðurin Cailean Machean til Føroyar í samband við, at hann ætlar at gera sjónvarpssendingar úr Føroyum á geliskum, sum síðan skulu sendast í BBC.

Cailean ætlar at lýsa so stóran part av føroyska samfelagnum sum gjørligt, og hevur hann ikki minst áhuga fyri føroyska dansinum. Hesum fekk hann nú eisini ein fyrsta honds kunnleika til á døgurðanum, sum varð hildin í leygarkvøldið, tá vístur var føroyskur dansur.

Cailian fer avstað aftur fríggjadagin í komandi viku.

Væntandi koma tiltøk sum hesi at økja um kunnleikan til hesi samfeløg hvør hjá øðrum. Hetta fer uttan iva eisini at eggja til meira samskifti og samstarv.



*Merkið veitrar á Isle of Sky til heiðurs fyri føroysku gestirnar.*



*Tíðindamaðurin Cailean Machean fer at gera sjónvarpssendingar úr Føroyum á geliskum.*